# Amerikumenn mistu luftina

*BJARGINGARVENJING. Ein niðurstøða eftir stóru venjingina hjá marinustøðini og US-Air Force vestan fyri Mykines óðinsdagin er, at venjingin var alt ov illa fyriskipað og at amerikanska útgerðin ikki riggaði nóg væl*



*Amerikanska Hercules C130 flogfarið var nógv seinkað til venjingina. Fallskíggjahermenninir lupu út hálvanannan tíma seinni enn ætlað.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Útgerðin hjá US-Air Force riggaði ov illa undir venjingini vestan fyri Mykines. Hesum gummibátinum tørvaði luft.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Høgni Mohr

»Nu maa de krafteddeme ta´ sig sammen«.

Hesi hørðu orð vóru bert nøkur millum mong, ið søgd vórðu um amerikanska avrikið undir bjargingarvenjingini, Brigth Eye North 4, ið skipað var fyri 30 fjóringar vestan fyri Mykines óðinsdagin. Venjingin var fyriskipað í samstarvi millum donsku marinustøðina í Havn og amerikonsku 56th Rescue Squadron í Keflavík.

Spælt varð, at eitt hernaðarflogfar var dottið niður í havið í økinum. Síðani skuldi fallskíggjahermenn, útgjørdir við alskyns bjargingaramboðum, royna at veita teimum neyðstøddu hjálp og fáa tey umborð á verjuskipið. Hetta skuldi gerast í samstarvi við manningina á Triton og tvær amerikanskar tyrlur. Danska verjuskipið skuldi spæla hjálparskip, ið m.a. skuldi taka ímóti skaddum fólkum frá tyrlunum.

*At talan »bert« var um eina venjing sást týðuliga á hesum donsku marinarunum. Tó var danska avrikið frægari enn tað amerikanska.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

**Brek eftir brek**

Flestu føroyingar munnu minnast stóru bjargingarvenjingina, Erlu, í 1992, sum bæði luttakarar og fjølmiðlar kolldømdu fullkomuliga. Og Bright Eye North 4 dumpaði eisini so dyggiliga. Serliga tí amerikumenn ikki høvdu tryggjað sær, at tól og útbúnaður vóru í lagi áðrenn teir fóru á flog úr Keflavík.

Beint áðrenn Triton var komin úr Havn og á leiðina vestan fyri Mykines, fréttist, at amerikanska flogfarið við fallskíggjahermonnunum umborð hevði fingið trupulleikar og noyddist at venda aftur til Íslands.

Fyrsta brekið seinkaði venjingini hálvanannan tíma. Tá ið fallskíggjahermenn og gummibátar umsíðir vórðu tveittir úr flogfarinum, noyddust amerikumenn at biðja danir um luftfløsku til gummibátin, sum var tveittur úr flogfarinum. Onnur amerikanska tyrlan, sum skuldi lora tey neyðstøddu umborð á Triton, hevði eisini stórar trupulleikar við spælútgerðini. Hon riggaði snøgt sagt ikki. Tískil gekk tað alt ov seint fyri seg at bjarga teimum neyðstøddu umborð á verjuskipið, har tey skuldu hava læknahjálp.

Harumframt hildu danskir offiserar, at amerikanska tyrlumanningin bar seg ábyrgdarleyst at, tí hon undir venjingini loraði ein av statistunum einsamøllum niður á dekkið í einari børu. Tað var hildið at vera alt ov vandamikið. Talan var jú bert um eina venjing.

**Dølskur atburður**

Og at tað var venjing, og ikki veruleiki, var ongin av okkum eygleiðarum umborð á Triton í iva um. Tað er óivað klókt, at »kæft, trit og retning« eftir øllum at døma noyðast at víkja fyri einari meira pedagogiskari uppfatan av hernaðarlívinum. Men máti skal vera við. Eisini tá ið talan bert er um eina venjing.

Myndin av snøgt rakaðum donskum hermonnum við góðum og reystum kropsburði, í einslittum búnum og undir stívum kolli, stakk fullkomuliga sundur umborð á Triton hendan dýrdardagin vestan fyri Mykines. Tó so, lagnum og blíðskapinum bagdu onki. Marinararnir eru bara fittir. Men teir vóru ov dølskir undir venjingini og hugalagið tyktist rætt og slætt alt ov deydligt. Tað var alt ov óveruligt.

Manningin á Triton hevur eftir øllum at døma kortini hildið venjingina vera spennandi, tí privatu myndatólini hjá donsku hermonnunum vóru í hvussu so er mong í tali á dekkinum á Triton tær mest dramatisku løturnar.

**»Lortegrej«**

Uttan iva var danska avrikið undir venjingini kortini frægari enn tað amerikanska. Tað var kanska tí danir vóru á heimavølli. Men onnur orsøk kann eisini vera, at amerikonsku hermenninir vóru sera ungir og tessvegna ikki høvdu serliga drúgvar royndir í bjarging.

Donsku offiserarnir vóru fámæltir, tá ið venjingin var liðug móti kvøldi. Men á dekkinum á Triton avtalaðu teir beinanvegin at halda skjótan fund, har venjingin skuldi eftirmetast.

Seinastu viðmerkingina, vit hoyrdu ein av manningini mutla fyri seg sjálvan, áðrenn stevnt var inn á Sørvág eftir lokna venjing, var soljóðandi:

»I guder, amerikanerne har noget lortegrej«.

*Danir hildu tað vera ov vandamikið at lora einsamallan mann í børu niður á dekkið. Men amerikanska manningin á Pave-Hawk tyrluni gjørdi tað »the american way«.*
**Mynd: Jens Krisitian Vang**







# Biskupurin í Viborg prædikar í Klaksvík

*Hóast prestar og kirkjuráð í Christianskirkjuni hava sýtt Karsteni Nissen, biskupi í Viborg, at prædika í kirkjuni annan hvítusunnudag, boðar Føroya biskupur frá, at danski biskupurin fer at prædika har hendan dagin*



*Karsten Nissen, bispur í Viborg, prædikar í Christianskirkjuni 2. hvítusunnudag*

Edvard Joensen

Karsten Nissen, biskupur í Viborg fer at prædika í Christianskirkjuni annan hvítusunnudag klokkan 11.

Hesum boðaði Føroya biskupur, Hans Jacob Joensen, frá í gjár.

Karsten Nissen hevði annars fingið durafjórðingin frá parti av kirkjuráðnum í Christianskirkjuni og prestunum í Norðoya vestara prestagjaldi. Men hesi viðferð mótmæltu fleiri enn 600 kirkjufólk í Klaksvík, umframt at fleiri av hinum føroysku prestunum søgdu seg vera ósamdar við avgerðina.

Í telefaksi, sum sent er frá Føroya Stiftsstjórn, biskupsskrivstovuni, eftir afturlatingartíð fríggjadagin, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, frá, at Karsten Nissen, biskupur í Viborg, kortini fer at prædika í Christianskirkjuni annan hvítusunnudag.

Tað hevur ikki eydnast at fáa viðmerking frá bispi um, hví avgerðin hjá lokalu kirkjumyndugleikunum í Klaksvík nú er broytt.

Heldur ikki prestarnir í Klaksvík vóru at hitta, áðrenn blaðið fór til prentingar, og av kirkjuskrivstovuni í Christianskirkjuni varð upplýst, at har vóru eingi boð komin.

# Rýma frá óhappum

*Tað er ikki óvanligt, at bilførarar rýma frá ferðsluóhappum, og at óhappini ongantíð verða fráboðað løgregluni, upplýsir politistøðin í Runavík*

Dánjal Højgaard

Seinastu dagarnar hevur ein gulllittur Nissan persónbilur staðið á víkiplássinum við vestara munna á Norðskálatunlinum. Bilurin var illa skaddur, men politiið í Eysturoynni veit einki at siga um ferðsluóhappið.

Vakthavandi á politistøðini í Runavík sigur, at politiið í Eysturoyni onga fráboðan hevur fingið um persónbilin við Norðskálatunnilin.

- Tað kemur fyri, at ferðsluóhapp ikki verða meldað til politiið. Viðhvørt verður kanska ikki boðað frá fyrr enn 2-3 dagar eftir óhappið. Tað kemur kortini ikki ofta fyri, at tað slett ikki verður fráboðað, sigur vakthavandi Eivind Hansen.

**Fleiri møguleikar**

Tað kunnu verða fleiri orsøkir til, at ferðasluóhapp, sum tað við Norðskálatunnilin ikki verða fráboðað politinum verður sagt á politistøðini í Runavík. Tann, sum koyrdi, hevur kanska ikki havt koyrikort. Hann kann hava verið ávirkaður av rúsdrekka. Ella kanska var bilurin stolin.

Tá ið hendan myndin var tikin mikudagin vóru ongar nummarplátur á bilinum. Um bilurin ongar plátur hevði, tá ið óhappi hendi, er ikki greitt. Men sambært politinum er tað kortini ikki vanligt, at fólk sjálvi taka



*Hesin illa skaddi persónbilurin hevur seinastu dagarnar verið sæddur við vestara munna á Norðskálatunlinum. Politiið í Eysturoynni hevur onga fráboðan fingið í málinum.*

pláturnar av bilinum eftir eitt óhapp.

-Hetta er eisini ein máti at krógva identitetin, sigur vaktavandi politistur í Runavík.

Í flestu førum má kortini roknast við, at bilførarin hevur áhuga í, at bilóhappið verður fráboðað politinum beinanvegin. Tí tryggingin tekur ikki við, verður skaðin ikki meldaður til politiið.

Líkt er til at tryggingarfeløgini í dag ert strangari við, at ferðsluóhapp skulu fráboðast beinanvegin. Ið hvussu er kemur tað ikki so ofta fyri í dag sum fyrr, at skaddir bilarnir sleppa at standa í fleiri dagar uttan, at nakrar ger vart við seg, sigur politiið í Eysturoynni.

# Fara at byggja hús á Helnabrekku

*Nú skulu 20 hús og íbúðir byggjast afturat á Helnabrekku í Klaksvík. Tað er Anskar Hansen , málarameistari, sum stendur fyri arbeiðnum*

Eyðun Klakstein

Nú verður aftur stórt virksemi á Helnabrekku í Klaksvík. Anskar Hansen, málaramestari, hevur fingið lendi til at byggja 20 smá sethús og íbúðir.

Húsini eru nú lýst til sølu, og tá fólk hava umbiðið átta hús, verður farið í gongd við at byggja tey fyrstu 10 húsini. Húsini verða í 70 fermetrar í einari hædd, og ætlanin er at byggja tey soleiðis, at tað verður lætt at sleppa til og frá teimum.

Húsini koma at liggja niðanfyri vegin norðanfyri húsini, sum frammanundan eru á Helnabrekku.

Íbúðarneyðin í Klaksvík er stór, og rættiligur gravgangur hevur seinastu tíðina verið eftir húsum og íbúðum.

- Vit hava rokna hesa ætlan soleiðis út, at fólk koma at gjalda undir 3000 krónur netto fyri húsini um mánaðin, sigur Anskar Hansen.

**Klára at flyta inn í**

Húsini eru ætlað ungum sum gomlum, og húsini liggja nærindis økinum, har Klaksvíkar kommuna í næstum fer at byggja eldraíbúðir.

Ymisk feløg koma at gera tey ymsu arbeiðini, sum skulu gerast í sambandi við bygginina, og tá arbeiðið er liðugt, kunnu húsini keypast fyri 590.000 krónur. Tá eru tey klár at flyta inn í.

Fólk skulu sjálvi syrgja fyri fíggingini hjá peningastovnunum, og tað eru tað nøkur sum longu hava gjørt, tí fyrstu húsini eru umbiðin.

# Stórt tiltak í Limmilund í Leirvík

*Umhvørvið verður sett í hásæti í Leirvík í dag, tá skipað verður fyri tiltaki í Leirvík. M. a. fara børnini í komandi 1. flokki at planta trø*

Eirikur Lindenskov

Í dag verður stórt tiltak í Limmilund í Leirvík. Har hava tey valt at seta umhvørvið í hásætið í dag, og nógv ymiskt er á skránni, sigur Tórhild Bjarkhamar, bygdaráðslimur og formaður í umhvørvisbólkinum hjá Leirvíkar kommunu.

Á skránni verða sangir, røður, klarinettorkestur, og børnini í komandi fyrsta flokki fara at planta hvør sítt træ. Møgueliki verður hjá bygdarfólkinum at ogna sær ein plantupakka.

Ananrs er skráin hendan:

Kl 10:00 fer bygdarráðsformaður at seta hátíðarhaldið. Síðani verðru felagssangur, børnini spæla klarinett, Tróndur Leivsson, skótfúti, flytir fram røðu, gentukórið syngur, heiðurskvøða, gentukórið syngur.

Kl 11:30 fer komandi fyrsti flokkur at planta trø saman við foreldrum, felagssangur, matpakki verður etin, felagssangur við harmoniku.

Heitt verður á fólk um at hava matpakka og grønu songbók við, verður sagt úr Leirvík.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL** Sýnaður 04-98<br>**Skrás.:** 02-04-98<br>**Km.:** 24.000<br>**Prísur:** 218.600,- **Garanti**** | **TOYOTA COROLLA 1,3 XLi H/B** Sýnaður 02-00<br>**Skrás.:** 23-08-95<br>**Km.:** 80.000<br>**Prísur:** 87.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 2,0 TDi**<br>**Skrás.:** 05-11-96<br>**Km.:** 70.000<br>**Prísur:** 145.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Stendur í Klaksvík Sýnaður 01-00<br>**Skrás.:** 08-10-96<br>**Km.:** 45.000<br>**Prísur:** 103.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 2,0 TDi**<br>**Skrás.:** 12-07-96<br>**Km.:** 78.000<br>**Prísur:** 142.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA** Sýnaður 12-99<br>**Skrás.:** 11-04-95<br>**Km.:** 64.000<br>**Prísur:** 93.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 2,0 TDi**<br>**Skrás.:** 21-06-96<br>**Km.:** 143.000<br>**Prísur:** 132.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,6 4 WD** Sýnaður 12-99<br>**Skrás.:** 04-01-89<br>**Km.:** 92.000<br>**Prísur:** 59.600,- |
| **TOYOTA CARINA 2,0 Gli Aut. gear**<br>**Skrás.:** 13-06-96<br>**Km.:** 82.000<br>**Prísur:** 127.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,6 Gsi SEDAN** Sýnaður 01-99<br>**Skrás.:** 22-10-91<br>**Km.:** 171.000<br>**Prísur:** 58.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,8 Gli** Stendur í Klaksvík<br>**Skrás.:** 10-11-95<br>**Km.:** 90.000<br>**Prísur:** 120.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 STW.** Sýnaður 02-99<br>**Skrás.:** 01-06-92<br>**Km.:** 82.000<br>**Prísur:** 68.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,8 Gli**<br>**Skrás.:** 28-06-95<br>**Km.:** 70.000<br>**Prísur:** 119.600,- **Garanti*** | **TOYOTA STARLET 1,3 Xli 3 hurð.**<br>**Skrás.:** 30-09-97<br>**Km.:** 29.000<br>**Prísur:** 86.600,- **Garanti**** |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Gli** Sýnaður 10-97<br>**Skrás.:** 10-05-95<br>**Km.:** 89.000<br>**Prísur:** 98.600,- **Garanti*** | **TOYOTA STARLET 1,3 Xli 5 hurð.**<br>**Skrás.:** 03-07-96<br>**Km.:** 59.000<br>**Prísur:** 74.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 H/B**<br>**Skrás.:** 27-04-99<br>**Km.:** 9.000<br>**Prísur:** 145.600,- **Garanti**** | **FORD ESCORT 1,8 TDi STATION**<br>**Skrás.:** 08-10-97<br>**Km.:** 22.000<br>**Prísur:** 132.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 L/B LUNA**<br>**Skrás.:** 25-01-99<br>**Km.:** 21.000<br>**Prísur:** 136.600,- **Garanti**** | **FORD ESCORT 1,8 DIESEL**<br>**Skrás.:** 01-06-95<br>**Km.:** 149.000<br>**Prísur:** 84.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA** Stendur í Klaksvík<br>**Skrás.:** 16-03-98<br>**Km.:** 50.000<br>**Prísur:** 122.600,- **Garanti**** | **VOLVO 460 SEDAN** Sýnaður 06-99<br>**Skrás.:** 25-05-90<br>**Km.:** 88.000<br>**Prísur:** 58.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN**<br>**Skrás.:** 15-12-95<br>**Km.:** 38.000<br>**Prísur:** 97.600,- **Garanti*** | **HONDA CIVIC** Sýnaður 06-99<br>**Skrás.:** 26-11-91<br>**Km.:** 138.000<br>**Prísur:** 45.600,- |
| **AVHEINTINGARTILBOÐ** | **VØRUVOGNUR** |
| **FORD ESCORT 1,3** Sýnaður 05-99<br>**Skrás.:** 16-08-88<br>**Km.:** 118.000<br>**Prísur:** 5.000,- | **TOYOTA PREVIA 240 Gli**<br>**Skrás.:** 27-12-94<br>**Km.:** 58.000<br>**Prísur:** 98.600,- **Garanti*** |
| **FIAT TIPO STATION** Sýnaður 02-00<br>**Skrás.:** 29-12-89<br>**Km.:** 78.000<br>**Prísur:** 8.000,- | **TOYOTA HIACE 4x4** Sýnaður 07-98<br>**Skrás.:** 19-10-87<br>**Km.:** 165.000<br>**Prísur:** 49.600, Stendur í Klaksvík |
| **RENAULT 19 GTS**<br>**Skrás.:** 13-04-90<br>**Km.:** 195.000<br>**Prísur:** 15.000,- | **NISSAN PATROL** Sýnaður 12-98<br>**Skrás.:** 01-07-89<br>**Km.:** 194.000<br>**Prísur:** 67.600,- |

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820